umhvørvisstovan

P/F VEST PACK
FJARÐAVEGUR 10
350 VESTMANNA

Argir hin 20-10-2009
Málnr: 09/00008-14
Málsviðgeri: Suni Petersen

# UMHVØRVISGÓÐKENNING
# KLORTAPPING
# HJÁ P/F VEST PACK

## 1. Góðkenning

Henda umhvørvisgóðkenning av klortappiskipan hjá P/F Vest Pack, matr. nr. 216 o, 216 p og 216 q í Vestmanna, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

## 2. Umsóknin

Umhvørvisstovan fekk hin 9. september 2009 umsókn um umhvørvisgóðkenning av tappianleggi til klor og goymslu frá P/F Vest Pack, og ískoyti til umsóknina hin 16. september 2009, herundir tekningar.

## 3. Lýsing av virkinum

Tappianleggið verður í fyrsta umfari í eini bingju uttanfyri. Seinni er ætlanin at innrætta serligt rúm í eini av høllunum hjá P/F Vest Pack.

Klorblandingin (hypoklorit) verður pumpað úr tanga uppá 20 - 30 $m^3$ yvir í 1.000 litur plasttangar við rammu, ið standa á platti. Møguliga verður eisini tappað í 25 litur dunkar.

Teir fyltu 1.000 litur tangarnir verða goymdir í bingju.

Sjálvt tappianleggið er innrættað við serligum tanga at taka møguligt spill undir arbeiðinum.

P/F Vest Pack framleiðir posar, folie o.a. úr plasti. Eisini verður prentað á plastvørurnar.

Virksemið við tapping og sølu av klori er ein nýggjur partur av virkseminum, og fevnir henda umhvørvisgóðkenning bara um tann partin av virkseminum.

Virkið hevur ætlan um at fáa alt virksemið umhvørvisgóðkent. Í tí sambandi verður nýggj góðkenning givin, sum fevnir um alt virksemið hjá P/F Vest Pack á staðnum.

## 4. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Eingin framleiðsla er í sambandi við klorskipanina. Tí er einki útlát frá virkseminum uttan tað, sum kann koma fyri vegna óhapp, so sum lekar á íløtum, rørum o.ø., og útlát frá bilum í sambandi við flutning.

## 5. Málsviðgerð

Grundarlagið undir málsviðgerðini er fyrst og fremst tað tilfar, sum er partur av umsóknini. Eisini eru fundir og samrøður millum Umhvørvisstovuna og P/F Vest Pack partur av grundarlagnum.

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á, at innrætting og mannagongdir á virkinum forða fyri at møgulig óhapp hava útlát og dálking við sær.

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent til P/F Vest Pack opg Vestmanna kommunu til viðmerkingar. Hvørgin teirra hevði nakrar viðmerkingar.

## 6. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er treytað av hesum ásetingum:

### 6.1 Innrætting og rakstur

6.1.1 Økið, ið hoyrir til virkið, skal vera avbyrgt og haldast ruddiligt og reint.

6.1.2 Undirlagið á øllum økjum, ið hoyra til virkið, har ið møguleiki er fyri, at kemisk evni, olja ella annað, kunnu leka, skulu vera úr tøttum tilfari, sum t.d. asfalti ella betong.

6.1.3 Undir arbeiði, har vandi er fyri spilli av evnafrøðiligum evnum, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

### 6.2 Goymslur

6.2.1 Allar goymslur skulu innrættast soleiðis at útlát vegna lekar v.m. skulu kunnu haldast aftur.

6.2.2 Eingi gólvfrárensl mugu vera á goymslum til kemikalii. Einki má kunna renna út úr goymsluni.

6.2.3 Goymslur skulu vera vardar móti vindi og regni.

6.2.4 Allar goymslur skulu vera læstar fyri óviðkomandi.

6.2.5 Vøra, sum stendur á goymslu uttandura, skal vera í íløtum, sum eru góðkend til uttandura goymslu av viðkomandi evni, ella í serligum kemikaliubingjum.

6.2.6 Evni, sum við samanblanding kunnu gera eitrandi sambond ella vanda fyri eldi, mugu ikki goymast saman.

6.2.7 Goymslur skulu innrættast soleiðis, at vandin fyri óhappum, sum kunnu føra til útlát, er so lítil sum gjørligt.

### 6.3 Luft og luktur

6.3.1 Virksemið má ikki vera orsøk til royk-, lukt- ella dustampar.

6.3.2 Um ampar verða av dusti, lukti ella øðrum, kann Umhvørvisstovan krevja at neyðug tiltøk verða sett í verk.

## 6.4 Óljóð, ristingar og ljós

6.4.1 Raksturin á staðnum má ikki hava við sær, at óljóðstøðið, ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið í dB(A) frá virkinum, fer upp um niðanfyri standandi mørk máld við næsta grannamark, á nevndu økjum og tíðarskeiðunum:

| Dagur | Tíð | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mán. - frí. | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygar. | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mán - frí. | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Leygar. | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgi. | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allir dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnarøki, har meira larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnarøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

6.4.2 Hægst loyvda løtuvirðið fyri óljóð frá virkinum í tíðarskeiðnum kl. 22-07 kann í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um nevndu markvirðini.

6.4.3 Alt virksemið skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur ampar av ristingum við sær.

6.4.4 Um ampar verða av óljóði ella ristingum, skulu neyðug tiltøk setast í verk til eitt støði, ið Umhvørvisstovan kann góðtaka.

6.4.5 Nýtsla av ljósum skal vera soleiðis, at hetta ikki hevur við sær ampa.

## 6.5 Vatn og spillvatn

6.5.1 Spillivatn frá virkinum má ikki bera brá av olju ella aðrari dálking.

## 6.6 Burturkast

6.6.1 Burturkast skal handfarast og goymast soleiðis, at tað ikki er til ampa ella dálking[1].

6.6.2 Burturkastið skal latast góðkendum móttakara, og skal skiljast sambært ásetingum frá móttakara.

## 6.7 Óhapp

6.7.1 Henda óhapp, sum kunnu hava dálking við sær, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk at avmarka og fyribyrgja møguligum avleiðingum.

6.7.2 Størri útlát ella dálking skal skjótast gjørligt fráboðast Umhvørvisstovuni[2]. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk til upprudding v.m. sendast Umhvørvisstovuni.

6.7.3 Virkið skal hava mannagongdir til fyribyrging av óhappum.

6.7.4 Virkið skal hava mannagongdir og útgerð til upprudding og avmarking av útlátum í sambandi við møgulig óhapp.

[1] Víst verður til kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

[2] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

## 6.8 Innaneftirlit

6.8.1 Virkið skal altíð tryggja sær, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar, um neyðugt við at gera egnar mátingar og skrásetingar.

6.8.2 Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið ger serligar kanningar fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.

6.8.3 Sýnistøkur og kanningar skulu gerast av persóni ella felag, sum Umhvørvisstovan kann góðtaka, og skulu gjaldast av virkinum.

## 6.9 Rakstrarskráseting

6.9.1 Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:
- Nøgd av klori, sum verður innflutt og seld,
- Nøgd og slag av burturkasti,
- Óhapp, sum hava havt útlát ella vanda fyri útláti við sær,
- Úrslit og eygleiðingar (checklistar) í sambandi við innaneftirlit.

6.9.2 Skrásetingarnar skulu goymast í minsta lagi í 5 ár, og teir skulu vera til taks hjá Umhvørvisstovuni.

6.9.3 Virkið skal eftir umbøn frá Umhvørvisstovuni senda inn rakstrarskrásetingar, úrslit av mátingum o.a. í hóskandi uppseting.

## 7. Alment

7.1.1 Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið økir um útlát ella vanda fyri útláti, fyrr enn góðkenning er fingin til hesa víðkan ella broyting.

7.1.2 Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni.

7.1.3 Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

7.1.4 Henda góðkenning skal altíð vera tøk á virkinum.

7.1.5 Starvsfólkini skulu kenna innihaldið í góðkenningini, og vera kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á.

7.1.6 Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóg.

7.1.7 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kann bert verða givið boð ella forboð, um so er at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingar-/skaðaárin,
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin, ella
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

7.1.8 Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir góðkenningina, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

## 8. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, kærast til Føroya landsstýri. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til Innlendismálaráðið við neyðugum skjølum.
Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Jóhanna Olsen, deildarleiðari

/

Suni Petersen, málsviðgeri

**Avrit:** Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postboks 9, 110 Tórshavn
Vestmanna kommuna, Postboks 91, 355 Tórshavn